# AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 7/2023**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: B68 kærir AB fyri brúk av ólógligum leikarum, 1. deild kvinnur** | |
| Deild: 1. deild kvinnur | Hvør hevur reist málið: B68 |
| Kapping: Landskapping | Nevndin móttikið kæru: 27. juni |
| Møguligt brot framt: 11. juni | Kærugjald goldið: Ja |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: |

## Úrskurður

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at AB brúkti tveir ólógligar leikarar í dystinum móti B68 11. juni hjá 1. deild kvinnum. Avleiðingin er, at AB verður dømt at tapa dystin 0-3 sambært § 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Fyri fusk við nøvnum á dómaraseðilinum verður AB eisini dømt at rinda bót á kr. 2.000 til FSF.

## Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli

B68 kærir AB fyri brúk av tveimum ólógligum leikarum í dysti inni í Vika spældur 11. juni, har AB vann 1-0. B68 vísir á, at annar leikarin ikki er váttaður í leikaraskrá FSF's meðan hin hevur leikaraloyvi í EB/Streymi. B68 hevur við mynd peika út ólógligu leikararnir hjá AB.

Í partshoyringarsvarinum hevur AB viðurkent, at tveir ólógligir leikarar vóru á liðinum, men at hetta var fyri at kunna manna lið til dystin og at hetta varð fráboðað venjaranum hjá B68 stutt undan dystinum. AB-venjarin skilti samrøðuna við B68-venjaran soleiðis, at tað var í lagi og at B68-venjarin upplýsti, at tey eisini høvdu tveir ov ungar leikarar á liðinum. AB skilti samrøðuna soleiðis, at venjararnir høvdu eina "gentleman agreement" um brúk av ólógligum leikarum fyri at dysturin kundi verða spældur.

Venjarin hjá B68 hevur eftir umbøn eisini gjørt viðmerkingar til málið og hevur afturvíst, at nøkur "gentlemen agreement" varð gjørd venjararnar ímillum og afturvísir eisini, at B68 hevði tveir ov ungar leikarar á liðinum. B68-venjarin vísir tó eisini á, at tað eru dømi um avtalur millum venjarar um brúk av ólógligum leikarum, tá feløg hava trupult við at manna lið, men tá eru avtalurnar gjørdar í góðari tíð undan dystin og eru uppá skrift.

## Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Vísandi til grein 2, 3 og 5 í aga- og etisku reglugerðini hjá FSF, hevur Aga- og etiskanevndin málsføri at viðgera hetta mál.

## Fakta í málinum

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at AB gjørdi brúk av tveimum ólógligum leikarum til dystin móti B68 11. juni. Aga- og etiskanevndin staðfestir eisini, at ongar undantaksreglur eru, sum loyva 1. deild kvinnum at brúka leikarar úr øðrum deildum, feløgum ella ikki skrásettar leikarar í førum, har ikki ella illa ber til at manna lið.

# AGA- & ETISKANEVNDIN

Aga- og etiskanevndin staðfestir sambært upplýsingum frá FSF, at FSF á felagsfundi í 2023 hevur umrøtt avbjóðingarnar at manna lið hjá fleiri feløgum, sum hava lið í 1. deild kvinnum. Hetta hevur tó ikki elvt til, at linari reglur eru gjørdar um at manna lið hjá 1. deild kvinnum.

Aga- og etiskanevndin staðfestir eisini, at av tí at nevndu leikarar ikki stóðu skrásettar undir egnum navni á dómaraseðilinum kann tað staðfestast, at AB hevur fuskað við nøvnum á dómaraseðilinum í nevnda dysti.

**Lógarverkið**

Sambært grein 15 í Kappingarreglunum fyri fótbólt, er ein leikari lógligur leikari um viðkomandi er skrásettur í leikaraskrá FSF's ella loyvisbræv leikarans er flutt og skrásett í leikaraskrá FSF's.

Sambært grein 28 í Kappingarreglunum fyri fótbólt, skal dómaraseðilin innihalda yvirlit yvir nøvn á leikarum, venjarum og øðrum ábyrgdarfólkum, sum hava samband við dystin.

**Staðfestingar, metingar og niðurstøða**

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at AB hevur viðurkent at hava brúkt tveir ólógligar leikarar í dystinum móti B68 11. juni 2023 hjá 1. deild kvinnum. Avleiðingin er, at AB verður dømt at tapa dystin 0-3 sambært § 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Fyri fusk við nøvnum á dómaraseðilinum verður AB eisini dømt at rinda bót á kr. 2.000 til FSF.

**Kæruvegleiðing**

Avgerðin um, at AB tapir dystin 0-3 kann, innan 5 dagar, kærast til Yvirkærunevndina samsvarandi grein 10, bókstav f. Avgerðin um bót kann ikki kærast.

**Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 1. juli 2023**

Anni á Hædd

Anni á Hædd
forkvinna

Í Aga- og etiskunevndini eru: Anni á Hædd, forkvinna og løgfrøðingur, Ken Nónklett, varaformaður og løgfrøðingur, Eli Thorsteinsson, løgfrøðingur, Jóhan T. Davidsen, løgfrøðingur og Sissal Kj. Kristiansen, sniðgevi og ráðgevi.